# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin í KFUK: Stokkakvøld við upplestri og andakt.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta.**
Fríggjakvøldið kl. 20 byrjar hvítusunnustevnan í bygdarskúlanum í Miðvági. Eingi møti og eingin sunnudagsskúli sunnudagin vegna hvítusunnustevnuna í Miðvági.
http://www.gospel.fo

**Stór hvítusunnumøtir í Losjuni í Havn**
Leygarkvøldið 26. mai kl. 20, hvítusunnudag kl. 18 og 2. hvítusunnudag kl. 18. Talarar: Palli Højgaard og Tórmund Hansen.
Sangur: Herman og Gigga og onnur.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Eingi møtir verða um vikuskiftið, vegna Hvítusunustevnuna í Vágunum
Sí www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mánadag til hósdag kl. 17.30 bøn fyri hvítusunnustevnuni. Fríggjakvøldið kl. 20 byrjar hvítusunnustevnan í bygdarhúsinum í Miðvági.

**Samkoman Kedron í Sørvági**
1. Hvítusunnudag ongi møtir vegna samfelagsmøtir í Klaksvík.
2. Hvítusunnudag ongi møtir vegna samfelagsmøtir í Klaksvík.
**Børnini møtast:**
Ongi tiltøk verður um hvítusunnuna vegna samfelagsmøtini í Klaksvík.
Mikudagin 30. mai Bønarmøti kl. 20.

**Saron Vestmanna**
Sunnudagin 27/5 onki møti vegna hvítusunnustevnu í Vágum.

**Missiónshúsið í Kollafirði**
Hvítusunnustevna verður í døgunum 24.-28. mai. Talarar ymsastaðni frá í landinum.

**Hvítusunnastevna í Kollafirði**
Hesi møti verða í Kollafirði: Hósdagin kl. 21: Bønarmøti í missiónshúsinum.
Stevnan heldur síðani fram í skúlahøllini:
Fríggjadagin kl. 20: Stevnan verður sett, leygardagin møti kl. 20.
1. hvítusunnudag møti kl. 20 og 2. hvítusunnudag møti kl. 18.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake í Lívsins Orð í Runavík. Arni Abrahamsen talar, Martin í Grund syngur
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Evni: Andans dópur og fylling. Øyvind Bjerkenes syngur. Barnamøti kl. 17
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Leygarkvøldið kl. 20 Evang. møti. Ung úr Kelduni luttaka. Sunnukvøldið kl. 20 Evang. møti. Ung úr Lívsins Orð luttaka, Flemming Berg talar. Mánakvøldið kl.19 Evang. møti. Ung úr Getsemane luttaka, Flemming Berg talar. Øll hjartaliga vælkomin.

**Karmel, Eiði**
2. Hvítusunnudag kl. 19 Møti v/ Sigurd Sørensen.

**Thabor, Fuglafjørður**
Møti er hvítusunnudag kl. 18, har Heini Kristiansen, KFS-skrivari, talar. 2. hvítusunnudag kl. 18 er tað Ísraelstoymið, ið hevur møti. Evnið er »Gud leiddi okkum« túrurin 2006.

**Rituvíkar Missiónshús**
Hóskvøldið kl. 20 Bønarmøti. Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Hvítusunnudag kl. 18:00 Møti
2. hvítusunnudag kl. 18 Møti.

**Hvítusunnumøtir í missiónshúsinum í Leirvík**
Leygardagin 26.mai kl. 20 Pól Johannesen talar Dramabólkur luttekur og ungdómskórið úr Havn syngur.
1. Hvítusunnudag kl. 13.30 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Sang- og vitnimøti, Tórhild, Inga, Poul Sune og Jóhan Edvard syngja.
2. Hvítusunnudag kl. 18 Marius Jacobsen talar, Húsakórið syngur
Innsavnan til húsið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Soli Deo Gloria Klaksvík**
Hóskvøld kl. 20 ungdómsmøti.
Hvítusunnudag kl. 18 møti.

**Hvannasund**
Møti í gamla skúlanum sunnukvøldið kl. 18, Justinus Poulsen talar.

**Missiónshúsið á Tvøroyri Hvítusunnumøtir 26.-28. mai 07**
Leygarkvøldið kl. 20 tala Alfred Olsen og Gulak Hansen, Gulak syngur. Hvítusunnudag kl. 18 tala Gulak Hansen og Alfred Olsen, kórið úr Porkeri syngur.
2. hvítusunnudag kl. 18 tala Alfred Olsen og Jógvan Højgård, kórið av Tvøroyri syngur.
Barnansing verður øll kvøldini. Drekkamunnur verður aftaná hvørt kvøldið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hjartaliga vælkomin til Hvítusunnumøtir í Hirtshals**
**Skrá fyri møtini á Hvítusunnu í Hirtshals**
Fríggjakvøldið 25. mai kl. 19.30 »Konsert« v/ Magna Christiansen o.f.
Leygarmorgunum 26. mai kl. 10 kaffi og rundstykkir, síðan Bíbliutími v/Vagn Foldbo. Kl. 15.00 Kaffi og Tema: »Eg, leiddur av Andanum?« v/Torleif Jóhannessen o.f. Kl. 19.30 Møti v/Vagn Foldbo Sangur v/Magna Christiansen Kaffi og eftirmøti.
Sunnudagin 27. mai kl. 18 Møti v/ Vagn Foldbo. Sangur v/Magna Christiansen.
Seinastu trý árini hevur verið skipað fyri »Føroyskum Ársdegi«, eina fer í Randers og tvær reisir í Århus.
Á ársdegnum hava vit hugnað okkum í góðum vinarlagi, við Guðs orðið og sangi og góðum mati.
Í ár verður ikki skipað fyri einum tílíkum føroyskum ársdagi, men vit vóna, at áhugi er fyri at koma til møtiróðina í Hirtshals á Hvítusunnu, og har møta landsmonnum – ja kanska, »fáa tvær flugir í einum« við at vitja vinir og kenningar har á leiðini.
Umhvørvið á Hirtshalsleiðini – ja í Norðurjyllandi sum heild, er eina vitjan verd. Har eru góðir møguleikar fyri at leiga summarhús ella campingvogn, og soleiðis njóta hesar frídagarnar, og samstundis hava møguleikan at hoyra Guðs orð, gjøgnum talu og sang.
Á alnótini finnast fleiri upplýsningar um umhvørvið í Norðurjyllandi og um møguleikarnar fyri yvirnáttan. Sí eitt nú :
www.toppenafdanmark.dk
www.visitnordjylland.dk
Eisini ber til at seta seg í samband við trúboðaran, sum møguliga kann vegleiða, um spurningar eru:
Heri Elttør tlf. 97473786 – 27513786 – Skype herielttor@tele2adsl.dk
Vitja eisini okkara nýggju heimasíðu www.utisetin.dk

**Felagið Tórshavn, gongutúrar**
Annan Hvítusunnudag 28. mai verður farið niðan á Strandafjall. Farið verður við bussi av Kunningarstovuni kl. 10. Minst til at hava góð og heit gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding 302425.

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl. 17 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
**Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Gongutúrur verður niðan á Knúk og Nøvina (Eysturoy) og víðari til Oyrar 2. hvítusunnudag 28. mai.
Vit møtast við tunnilsmunnan (Funningsfjarðarmegin) kl. 14. Túrurin er miðal.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Mánadagin 21. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, kánus, bobb o.o. spøl.
***Týsdagin 22. mai***
kl. 10-11.30 Sangur, Zacharias Sørensen og næmingar úr Hoydølum vitja. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 ***Barnaárini í brennideplinum***, Elin á Rógvi frá barnaútvarpinum
***Mikudagin 23. mai***
kl. 10-12 Tóvirkið (veving, maskinbinding, seyming, binding o.a.) Ása, Katrin, Margit, Marita og Marita.
***Vit fyrireika okkum til Mentanarnáttina 1. juni.***
kl. 15 ***«Likamsrørsla er av alstórum týdningi fyri at betra um fólkaheilsuna« (AHR). Njóti hetta saman við okkum. Vit ganga. Møti stundisliga. Túrur út á Boðanes.***
***Randi/Elisabeth, fysioterapeutar***
***Hósdagin 24. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 25. mai***
kl. 10-17 Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Landsfelag Pensjónista**
Felagið heldur til í Tróndargøtu 13, Tórshavn. Skrivstovan er opin hvønn týsdag frá kl. 13.00-16.00. Tlf. 319394 ella 219394.
LP@email.fo

**Dagtilhaldið í Gøtubrá, Gøtu tlf. 441662**
Opið týsdag kl. 15-18.

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
Opið er týsdag til hósdag kl 15 - 18.
***Týsdagin 22. mai***
Ymiskt handaligt og Tupperware v. Meiken Højgaard
***Mikudagin 23. mai***
Sangur v. presti Martin Restorff Jacobsen
***Hósdagin 24. mai***
Prát um staðarnøvn og ymiskt handaligt.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Vesturskin**
***Opið er týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.***
***Týsdag*** - fimleikur
***Mikudag*** - Sangløta.
***Hósdag*** - ymist ítriv.
*Allar dagar er møguleiki at lesa bløðini og fáa sær ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.*
*Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.*
*Opið mánadag til fríggjadag kl. 15.00 – 18.00.*
***Mánadagur 21. mai.***
Fimleikur. Felagssangur.
***Týsdagur 22. mai.***
Opið hús.
***Mikudagur 23. mai.***
Opið hús.
***Hósdagur 24. mai.***
Vit fáa vitjan av Dagtilhaldinum á Strondum.
***Fríggjadagur 25. mai.***
Boccia.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks, somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag kl 14 –17. Báðar dagarnar er drekkamunnur at fáa. Eisini eru bløðini til taks.
***Mánadagin 28. mai***
2. hvítusunudag stongt
***Mikudagin 30 mai***
Vit fara í Slavansdalin.
Vit koyra við bussi inn at vegnum, og ganga hagani um ánna og niðan til húsið, har vit fáa drekka. Bussur avheintar okkum aftur kl. 16.20. Havið gongustavnar við. Kostnaður 50,00 kr. Tilmelding á tlf 211921 seinast 28. mai.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum.**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá kl.15-18.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur: dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Sandoyar Kunningarstova 210 Sandur · tlf. 361836**
Skrivstovan er opin mánadag, týsdag, hósdag og fríggjadag kl. 11-15 og mikudag kl. 14-15.30.
www.visitsandoy.fo

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
er opin týsdag og hósdag frá kl. 19.00-21.00.
Tlf. 318586.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Leygardag: kl. 22.30-23.30 AA-fundur.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundir - (Big book meeting)**
Týsdag: kl. 20.00 Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18. Inngongd frá Bøkjarabrekku.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og týskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundir í Vestmanna**
Í Skótahúsunum
Hósdag kl. 20 AA-fundur.
Sunnudag kl. 17 AA-fundur (opin fundur).

**AA-fundir í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
fundur fyri avvarðandi at alkaholikkara er hvørt týskvøld kl. 21, á Mýruvegi 22.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).